# Perlan fær skap

**Nýggja Perlan, sum Tórshavnar kommuna letur byggja millum Reinsaríið og Miðlahúsið, fær í hesum døgum skap**

BYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í gjár og í dag hevur ein yvirvaksin krani staðið millum Reinsaríið og Miðlahúsið. Hann hevur hivað elementini til nýggju Perluna upp á pláss.

Arbeiðið gongur skjótt og væl, og ætlanin er, at bygningurin skal standa innilokaður til ólavsøku.

Perlan er ætlað at verða eitt nýtt spælistað í Havnini. Umvælingarnar til at fáa gamla Reinsaríið í skikkiligan stand eru so mikið dýrar, at býráðið hevur valt at bíða nakað við teimum. Í staðin verður so nýggja Perlan bygd, og hon skal so nýsa konsertum og øðrum mentanarligum tiltøkum í býnum.

Tað hevur í mong ár verið tosað um Tórsgøtu sum eina mentanargøtu, og byggingin av Perluni er enn ein liður í at menna hesa ætlan.

Tá byggingin er liðug er so klárt at fara undir at gera eitt torg millumReinsaríið, Perluna og Miðlahúsið, men tað verður kortini neyvan gjørt í ár. Bogi Andreasen hevur áður sagt fyri Sosialinum, at peningurin, sum er játtaður til Perluna, røkkur bert til sjálva byggingina, og tí verða fyribils keypt ljóðteppi at hanga upp.

Byggingin er nakað seinkað. Upprunaliga ætlanin var, at alt skuldi verða liðugt til ólavsøku, men arbeiðið kom eitt sindur seint í gongd, og tí er øll verkætlanin skotin út ein mánað.



*Ein yvirvaksin krani setur í hesum døgum elementini til Perluna upp*

*Mynd: Leo Poulsen*

# Oggi í Snarskivuni

**Hósdagin 16. juli kl. 16. letur Oggi Lamhauge upp framsýning í Snarskivuni við 20 myndum. Talan er um 14 grafisk blindprent, 5 útskornar relief myndi og eina innseting. Framsýningin hevur heitið Skuggaljós**

TÍÐINDASKRIV

Á hesari framsýning eru allar myndirnar hjá Oggi hvítar og gerast sjónligar við ljósi og skugga. Hetta skapar eisini heldur løgna orðið Skuggaljós, sum listamaðurin hevur valt at nevnt framsýningina. - Tí ljósið er fyritreyt fyri skugganum og hesi baði hanga saman í lívinum so væl sum í listini, sigur Oggi.



## Rekaviður og malargrót

Listamaðurin hevur skorið í linoplátu og onkuntíð límað metallstumpar omaná. Soleiðis fær listamaðurin dýpd og hædd í plátuna, sum undir stórum trýsti gevur avprent á pappír. Eisini hevur listamaðurin skorið relief myndir úr MDF plátum, sum eru hvítmálaðar. Umframt hesi verður ein innseting, innstallasjón, við einum rekatræi og malargróti.

## Listgrafikari

Oggi Lamhauge hevur verið virkin á listarliga økinum, her á landið og útlendis, síðan hann gjørdist liðugur við útbúgving sum listgrafikari við lærda háskúlan í Íslandi 1997. Kendasta verk hansara er uttan iva altartalvan í Hattarvíkar kirkju, sum varð latin kirkjuni í 2001. Listamaðurin fekk trý ára starvsløn frá Mentanargrunni Landsins í 2006.

## Framsýningin

Framsýningin Skuggaljós er opin í Snarskivuni 16. juli – 24. august 2009. Øll eru vælkomin til ein drekkamunn, tá framsýningin hjá Oggi Lamhuage letur upp hósdagin 16. juli 2009 kl 16, eins og at njóta myndlistina, tá Snarskivan er opin kl 9-16, hósdagar tó kl 9-18.

Rúmsátta, ljósa og hugnaliga hølið verður nýtt at sýna fram myndlist, har mong føroysk listafólk hava sýnt fram, síðani Snarskivan læt upp í 2000. Ein skilagóð sameining av kommunalari tænastu og listaskála, har listin hittir borgaran á alfaravegi


## Leiðari til Dagstovnin í Gøtu

Søkt verður eftir leiðara til Dagstovnin í Gøtu. Talan er um farloyvisstarv, frá 1. september 2009 til 1. august 2010.

Leiðarin hevur ábyrgdina av tí aðalmáli, ið er sett fyri stovnin, og av tí námsfrøðiliga virkseminum, ið verður gjørt.

Leiðarin hevur, í samstarv við Eysturkommunu, tað fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina.

Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur leiðsluroyndir.

Starvið er 40 tímar um vikuna.

Í Dagstovninum arbeiða 6 námsfrøðingar, 10 hjálparfólk og 2 stuðular.

**Um stovnin:**
Dagstovnurin lat upp 1. februar 2000, og er ásettur til 70 børn. Talan er um 3 barnagarðsstovur og 1 smábarnastovu. Stovnurin liggur í barnavinarligum umhvørvi, við Gøtugjógv.

**Førleikakrøv:**
- Námsfrøðiliga útbúgving.

**Vit ynskja av tær:**
- at tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir.
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag.
- at tú vilt vera við til at mynda og menna tað námsfrøðiliga umhvørvið.

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m. a. dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast, og fáa avbjóðingar í gerandisdegnum.
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn.
- at virða tað einstaka barnið
- at ferðast nógv í náttúruni.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðagevarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 24. juli 2009.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Torgerð Hansen, stovnsleiðara, á telefon 73 00 51.

Eysturkommuna



Eysturkommuna

## Vaskifólk

Søkt verður eftir einum vaskifólki til barnagarð í Leirvík at byrja 01. august 2009

Talan er um starv á 25 tímar um vikuna.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag

Umsóknir skulu verða Eysturkommunu, postboks 30, FO – 510 Gøta í hendi er mikudagin 22. juli 2009 kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ove Heinesen, umsitingarleiðara, á tlf. 730012